UTTAN ÚR HEIMI

# Andar sjálvur

*Ísraelæski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur sjálvur drigið andan, síðani læknarnir fóru undir at skerja doyvingina í morgun. Leiðslan á Hadassah-sjúkrahúsinum sigur, at tað kann taka tímar ella dagar at taka alla doyvingina burtur, og ikki fyrr enn tá fæst at vita, hvønn skaða heilin hevur fingið av bløðingini*

*Mynd: Reuters*



# Sigldi trolara niður og rýmdi

**Seinasta hósmorgun sakk ein lítil franskur trolari í Ermasundi, og fransmenn vilja vera við, at eitt farmaskip sigldi hann niður**

SAMANSTOYTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fýra av teimum fimm monnunum sjólótust, tá franski trolarin "Klein Familie" sakk hósmorgunin í síðstu viku. Trolarin var úr Cherbourg, og har eru menn ikki í iva um, at tað var farmaskipið "Sichem Pandora", sum sigldi trolaran niður, og at skipið helt leiðina fram uttan at steðga. Kanningar av skipinum avdúkaðu reyða máling ein metur niðan fyri vatngangin, og fransmenn halda uppá, at málingin stavar frá trolaranum. Tí hava fronsku myndugleikarnir gjørt av at leggja hald á skipið eftir kravi frá teimum avvarðandi.

"Sichem Pandora" er skrásett á Malta, men tað er Oslo-felagið Carmillo Eitzem, sum rekur tað. Danska felagið Tesma holding er dótturfelag hjá Carmillo Eitzen, og stjórin í danska felagnum, Claus Thornberg, sigur við Aftenposten, at har hava tey einki ímóti, at málið verður kannað. Hann vísir tó á, at manningin á "Sichem Pandora" hevur avsannað, at skipið sigldi á franska trolaran.

Fronsku myndugleikarnir hava ikki lagt seg út í málið enn. Teir siga, at teir fara fyrst at bíða eftir kanningunum, sum skulu vísa, um málingin á "Sichem Pandora" stavar frá "Klein Familie". Vrakið av trolaranum skal eisini kannast.

# Blair eigur at koma fyri ríkisrætt

**Bretski generalurin Michael Rose heldur, at Tony Blair eigur at koma fyri ein ríkisrætt í sambandi við kríggið í Irak**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*




*Michael Rose, generalur, vil hava Blair fyri ein ríkisrætt*

*Mynd: Reuters*

– Politikararnir eiga at standa til svars fyri tað, teir hava gjørt, og sjálvur haldi eg, at forsætisráðharrin eigur at koma fyri ein ríkisrætt. Tað hevði fingið politikararnar at aftra seg við at draga landið upp í eitt kríggj eina aðru ferð.

Tað sigur bretski generalurin Michael Rose við blaðið Mail on Sunday. Generalurin, sum var ovasti fyri ST-deildunum í Sarajevo í Bosnia í nítiárunum, sigur, at hann hevði í hvussu er ikki valt at fara í kríggj á einum so tunnum grundarlagi, sum bretska stjórnin hevði, tá hon gjørdi av at fara í kríggj við Irak.

Fyri einum góðum ári síðani skutu 23 parlamentslimir upp at leggja ríkisrættarsak ímóti Tony Blair. Uppskotið fall, men tað vakti kortini stóran ans, tí eitt tílíkt uppskot hevur ikki verið í parlamentinum tey seinastu 198 árini.

## Óvanliga kalt í Asia

Tað hevur verið óvanliga kalt í stórum pørtum av Asia í seinastuni, og kuldin hevur eisini kravt fleiri mannalív. Kuldin kemur úr Sibiria, og veðurmenninir vænta onga broyting enn.

Har norðuri í India eru umleið 100 fólk deyð tær báðar seinastu vikurnar. Í høvuðsstaðnum New Dehli hava verið 0,2 stig, og so kalt hevur tað ikki verið har tey seinastu 50 árini. Í grannalandinum Bangla Desh hevur kuldin kravt umleið 20 mannalív.

Í Kina hava myndugleikarnir flutt fleiri hundraðtúsund fólk burtur, og í landspartinum Xinjiang hava veðurstøðirnar mátað niður í heili 43 kuldastig. So kalt hevur btað ikki verið í Japan, men har hevur tað kavað so illa sum neyvan nakrantíð fyrr. Kuldin hevur kostað 63 japanum lívið, og stjórnin hevur sett hermenn at grava kava, so fólk kunnu koma vegin fram. Her norðuri í landinum eru hermenn eisini settir at grava kava oman av húsatekjum, tí vandi er fyri, at tær kunnu hoykna undan tí nógva kavanum.

## Bjartskygni í vinnulívinum

Vinnulívsleiðarar í Evropa og Japan halda, at útlitini fyri 2006 eru góð, og at tað fer at geva fleiri arbeiðspláss og veksandi eftirspurning, skrivar Reuter.

Í Evropa eru tað serliga tænastufyritøkurnar, sum vænta vøkstur í ár, og tey seinastu hagtølini vísa eisini, at vøksturin nú er tann størsti í tvey ár, og at nógv nýggj arbeiðspláss eru komin í tænastuvinnuni. Í Japan er tað harafturímóti ídnaðurin, sum væntar sær nógv burtur úr nýggja árinum, og hagtølini har vísa eisini vøkstur ta seinastu tíðina.

Eisini í USA eru tekin um framburð í búskapinum, men tað fer neyvan at geva fleiri nýggj arbeiðspláss. Roknað verður við, at arbeiðsloysið har verður um fimm prosent í ár.

## Vil tosa við Taliban

Forsetin í Afghanistan, Hamid Karai, sigur seg nú vera til reiðar at hitta Taliban-leiðaran mullah Omar, men sjálvur væntar hann ikki, at Talibanleiðarin fer at taka av tilboðnum. Omar hevur fjalt seg, síðani Taliban varð rikið frá valdinum á heysti í 2001, og USA hevur lovað at gjalda finningarløn, verður hann tikin.

– Vit vilja fegin lurta eftir, hvat hann hevur at siga, men eg vænti ikki, at hann kemur. Vit vita ikki, hvar hann fjalir seg, men vit vilja fegin tosa við hann, segði Karzai í einari samrøðu í gjár.

Í samrøðuni nam hann eisini við ta stóru rúsevnisframleiðsluna í Afghanistan. Hann segði, at teir nógvu rúsevnispengarnir eru ein hóttan ímóti tí almenna búskapinum og landsins fullveldi. Sambært forsetanum er rúsevnisframleiðslan ein størri hóttan enn yvirgangsmenninir, og hann hartar tey útlendsku brotsmannaliðini, sum leggja trýst á teir afghansku bøndurnar fyri at fáa teir at dyrka opium.



*Mynd: Reuters*

## Úlvur doyði av hundasjúku

Amerikanskir granskarar undrast á, at 47 av teimum 69 úlvahvølpunum, sum vórðu lagdir í Yellowstone-náttúrulundini í fjør, doyðu stutt eftir. Hetta er størsta fellið í Yellowstone seinastu ellivu árini.

Nú halda granskararnir, at hvølparnir doyðu av sjúkuni parvo virus, sum er ein hundasjúka, og teir hava gjørt av at taka blóðroyndir av fleiri úlvum fyri at fáa staðfest, um metingin er rætt.

Doug Smith, sum hevur ábyrgdina av úlvunum í Yellowstone, sigur við AP, at tað stóra fellið er ein álvarssom hóttan ímóti úlvunum har, og at tað er umráðandi at finna orsøkina.